# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Oljan nærkast

Tíðindini um at eitt av heimsins størstu oljufeløgum, Chevron er farið at testa tvs. royndarframleiða olju frá Rosebankkelduni á bretska landgrunninum eru so sanniliga eisini góð og kærkomin fyri Føroyar. Hóast hetta ikki er á okkara landgrunni, so liggur henda stóra oljukelda so tætt við, at tað er ikki óhugsandi, at løgini okkaru megin markið eru júst tey somu, og í besta føri kann tað henda, at her er talan um eina keldu, sum gongur tvørtur um markið.

Tað var skiparin á Lómi, Amaliar Haraldsen, sum sunnudagin fekk eygað á boripallin Transocean Rather. Frá brúnni kundi hann síggja gassloga, sum er prógv fyri, at her verða kolvetni framleidd. Myndir av gassloganum geva nú umheiminum eina týðiliga ábending um, at her er nakað við at henda. Oljufeløg testa ikki ein brunn uttan at tey hava vónir og vitan um, at her veruliga er talan um eina rakstrarverduga oljukeldu.

Nú kundi so verið spurt, hví júst ein oljukelda í bretskum øki hevur okkara áhuga. Svarið er, at hon kann geva okkum ábendingar um, hvussu jarðfrøðiligu viðurskiftini eru rundan um eisini tvs. inni á føroyska landgrunninum. Her hevur tú eina oljukeldu, sum liggur mitt í basaltløgum, vitandi at alt tað føroyska økið er fjalt av basalti. Merkir hetta, at basaltið, sum varð hildið at vera ein forðing, kanska beint tvørturímóti nú er at meta sum ein møguleiki – sum nakað positivt!

Tað, sum er mest avgerandi fyri framhaldandi leiting, er, at tú hevur okkurt at fara eftir, onkra gularót um man so kann siga. Tá Rosebankkeldan varð funnin í 2004 var hon gularótin hjá feløgunum, sum buðu sær at vera við í 2. útbjóðing við Føroyar. Hetta fund vakti í veruleikanum áhugan hjá fleiri feløgum at bjóða uppá øki og her serstakliga tætt upp at markinum. Nú stendur so enn ein útbjóðing fyri framman. Og aftur nú fara vit helst at síggja ein vaksandi áhuga hjá feløgum at vera við, nú testingin av Rosebank gevur okkum eina ábending um, at her er kolvetni í rakstrarverdugum nøgdum. Og ein møgulig framtíðar útbygging so tætt upp at okkara øki vil so aftur fáa stóran týdning fyri okkum eisini, tá hugsað verður um infrakervið og flutning av eitt nú gassi inn á meginlandið.

Henda oljukeldan á bretska landgrunninum kann gerast katalysatorurin og duraupplatarin til eina spennandi og virkna leiting á føroyskum øki komandi árini. Haraftrat kemur so Williambrunnurin, ið skal borast í heyst. Samanumtikið kann sigast, at "avdúkingin" á brúnni á Lómi kann birta nýtt lív í aftur vónirnar, at fyrr ella seinni verða kolvetni eisini staðfest í ella undir basaltinum á okkara landgrunni. Oljan nærkast.

**Sosialurin**

## Hví kunnu vit ikki keypa danskar fruktir?



**JÓGVAN E. ÓSÁ**
josa@post.olivant.fo

Tað hevur undrað meg og mangan. Hvussu ber tað til, at vit ikki kunna keypa danskar fruktir í Føroyum??

Danskar fruktir eru so nógv tær bestu - og áttu verið tær bíligastu.

Men vit fáa tær ikki.

Danmark er í løtuni við at ganga undir í jørðberum - tey verða seld fyri næstan onki - men nei, vit fáa onki av tí.

Næstseinast eg keypti jørðber, vóru tey týsk, og tey smakkaðu hvørki eitt ell annað. Í dag havi eg keypt fransk jørðber. Sóu gott út ovast - men hýggjuskotin í botninum og tey smakklaðu onki.

Tað sama við súreplum. Tað er onki so gott sum eitt danskt súrepli, sum er vaksið upp í einum donskum súreplagarði - súrt og deiligt. Tað tú fær í handlinum í dag, líkist ikki súrepli, um tað er reytt ella grønt. Tað er søtt - ofta hart - og hevur ongan smakk.

Tað mátti verið onkur í Føroyum, sum sá eina forrætning at selt danska frukt. Frukt, ið smakkar. Eg skal lova tær - saman við fleiri - at eg skal keypa.

# Chevron og Statoil vátta testing

**Tíðindini í Sosialinum mándagin um at eldur og roykur koma upp úr oljubrunni nær markið koma ávart á oljufeløg. Eftir øllum at døma skuldi einki leka út enn**

**OLJULEITING**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Lítið og einki er higartil likið út um stóru boriætlanina hjá Chevron, Statoil, DONG og OMV á bretskum øki skamt frá føroyska markinum. Feløgini, sum í 2004 søgdu seg hava gjørt eitt stórt oljufund á Rosebankleiðini, hava nú í skjótt eitt ár borað avmarkingar- og metingarbrunnar fyri at vita, hvussu stór keldan er. Sunnudagin komu so fyrstu lívstekini frá hesi umfatandi og kostnaðarmiklu boriætlan. Tá Lómur sigldi framvið boripallin stóð eldur og roykur upp úr torninum. Nú vátta bæði Chevron og Statoil, at tey eru í ferð við attesta ella royndarframleiða í brunninum.

Murial Roberts, pressustjóri hjá Chevron sigur við Sosialin, at tey testa brunnin. Eisini Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil váttar, at tey eru í ferð við at testa brunnin. Hann váttar, at hetta er tann næsti av trimum brunnum, sum verða boraðir fyri at vita, hvussu stór oljukeldan er og hvussu hon háttar seg.

Sum skilst, so sær hetta eftir øllum at døma sera lovandi út. Hetta kann vera byrjanin til fyrstu fyrireikingarnar at fara undir eina oljuframleiðslu tætt upp at føroyskum marki.

## Norðurlendsku postfakfeløgini stuðla Føroya Postfelag

Uttalande: De nordiska fackförbunden inom postsektorn uttalar härmed sitt fulla stöd för den färöiska fackförbundet Färöija Postfelag i deras kamp för rätten att teckna kollektivavtal för sina medlemmar. Det är en självklar rätt för anställda att organisera sig i fackföreningarna och därigenom rätten att förhandla om sina medlemmars anställningsvillkor. Åtgärder som syftar till att begränsa eller hindra facklig verksamhet hör inte hemma i ett modernt samhälle. Detta uttalande har antagits av de nordiska fackföreningarna inom postsektorn (NPU) vid årsmötet i Visby, Sverige den 27 juni 2007.

**Postkom Norge**
**3F Danmark**
**HK Danmark**
**SECO Sverige**
**ST Sverige**
**PAU Finland**
**PF Island**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.